Kappingareftirlitið

**Reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025**
**um**
**samanleggingar**

Við heimild í § 16, stk. 3 í løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2023 um kapping, sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 26. mars 2024, verður ásett:

**§ 1.** Ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum í eini samanlegging skulu senda Kappingareftirlitinum fráboðan um samanleggingar sambært §16, stk. 1.
*Stk. 2.* Har tvær ella fleiri sjálvstøðugar fyritøkur verða lagdar saman eftir §13, stk. 1, nr. 1, skal fráboðan latast inn av hvørjari einstakari av fyritøkunum sum verða samanlagdar.
*Stk. 3.* Har einaræði ella felagsræði fæst á aðrari ella parti av aðrari fyritøku eftir §13, stk. 1, nr. 2 skal fráboðan lætast inn av teimum fyritøkum ella persónum sum fáa ræðið.
*Stk. 4.* Har alment tilboð um yvirtøku verður latið, skal tann, sum hevur latið tilboðið, fráboða.

**§ 2.** Ein samanlegging kann fráboðast eftir vanligum ella einfaldum leisti.
*Stk. 2.* Ein fráboðan eftir vanligum leisti skal fyri at verða fullfíggjað eftir §18, stk. 1, innihalda allar tær upplýsingar og skjøl, ið eru nevnd í skjali K2.
*Stk. 3.* Ein fráboðan eftir einfaldum leisti skal fyri at verða fullfíggjað eftir §18, stk. 1, innihalda allar tær upplýsingar og skjøl, ið eru nevnd í pkt. 1-10 í skjali K2.
*Stk. 4.* Fráboðari kann koma við umbøn um, at fráboðan eftir stk. 2 og 3 verður javnsett við eina fullfíggjaða fráboðan, hóast fráboðanin ikki inniheldur allar kravdar upplýsingar og skjøl. Fráboðari skal grundgeva fyri hví upplýsingar ella skjøl ikki eru neyðug hjá Kappingareftirlitinum til tess at meta um samanleggingina.

**§ 3.** Samanleggingar kunna fráboðast eftir einfaldum leisti, tá:

1) tvær ella fleiri fyritøkur fáa felagsræðið á einum samváða, ið ikki ella bert í avmarkaðan mun hevur virksemi í Føroyum.
2) ein fyritøka fær fult ræði á eini aðrari fyritøku, sum hon frammanundan hevur ræði á saman við øðrum.
3) Samanleggingar ella yvirtøkur har ongin av luttakandi fyritøkunum eru virknar á sama vøru- og landafrøðiliga marknað, ella har ongin av luttakandi fyritøkum eru virknar á einum fyrra ella seinna marknað til marknaðar har onnur luttakandi fyritøka er virkin.
4) tvær ella fleiri fyritøkur leggja saman, og luttakandi fyritøkurnar tilsamans hava í mesta lagi 15% av marknaðinum ella hava saman í mesta lagi 25% av einum marknaði í einum fyrra ella seinna liði til ein marknað har onnur luttakandi fyritøka hevur virksemi.
5) ein ella fleiri fyritøkur fáa eina- ella felagsræði á eini aðrari fyritøku, og luttakandi fyritøkurnar tilsamans hava í mesta lagi 15% av marknaðinum ella hava saman í mesta lagi 25% av einum marknaði í einum fyrra ella seina liði til ein marknað har onnur luttakandi fyritøka hevur virksemi.
6) Samanleggingin er fevnd av §14, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini.
7) Samanleggingar, har luttakandi fyritøkur reka virksemi sum krevur loyvi sambært kapittul 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23 desember 2019 um sjófeingi, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 155 frá 20. desembur 2023.

*Stk. 2.* Hóast ein samanlegging er fevnd av teimum í stk. 1, nevndu førum, kann Kappingareftirlitið krevja at fráboðað verður eftir vanligum leisti, sbrt. §2, stk. 2 í hesi reglugerð. Hetta kann Kappingareftirlitið krevja líka fram til at samanleggingin er góðkend eftir §15, stk. 1 ella stk. 7 í kappingarlógini.

**§4.** Kappingareftirlitið upplýsir innan 8 yrkadagar eftir móttøku av fráboðan, sbrt. §2, um fráboðanin er fullfíggjað.

*Stk. 2.* Metir Kappingareftirlitið at fráboðanin er ófullfíggjað, gevur eftirlitið innan áður nevndu freist fráboðaranum boð um hetta, og ásetir hvørjar upplýsingar skulu latast og freistina fyri hesum.

*Stk. 3.* Ein fráboðan fevnd av stk. 2 verður at rokna sum fullfíggjað tann dagin, tá ið Kappingareftirlitið hevur móttikið upplýsingarnar, ið biðið var um.

**§5.** Metir Kappingareftirlitið, at ein transaktión sum er fráboðað ikki er fevnd av §13 í kappingarlógini, boðar eftirlitið fráboðara frá hesum.

*Stk. 2.* Fráboðari kann síðani senda Kappingareftirlitinum umbøn um at viðgera fráboðanina eftir §8, stk. 2, §9 ella §11, stk. 2 ella 5 í kappingarlógini. Slík umbøn skal vera eftirlitinum í hendi innan 4 vikur eftir at boð eru givin sambært stk.1.

*Stk. 3.* Kappingareftirlitið kann krevja at aðrar upplýsingar verða lagdar afturat upplýsingunum í fráboðanini, um hetta er neyðugt til tess at kunna meta um viðurskifti eftir §8, stk. 2, §9 ella §11, stk. 2 ella 5 í kappingarlógini.

**§6** Henda reglugerð kemur í gildi tann 3. januar 2025. Reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012 fer úr gildi sama dag.

Kappingareftirlitið, tann 3. januar 2025

Heri Joensen
Formaður í Kappingarráðnum

/ Terje Sigurðsson
Deildarstjóri í Kappingareftirlitinum

Kappingareftirlitið

# FYLGISKJAL 1

## SKJAL TIL FRÁBOÐAN AV SAMANLEGGINGUM TIL KAPPINGAREFTIRLITIÐ (K 2)

(Við heimild í §16, stk. 3 í løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2023 um kapping, sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 26. mars 2024)

nýtast til

**fráboðan av samanleggingum og sjálvstøðugt virkandi samváðum**

---

**Leistur fyri fráboðan**

Set kross hvørt

☐ Fráboðað verður eftir einføldum leisti, sbrt. §2, stk. 3 í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025

☐ Fráboðað verður eftir vanligum leisti, sbrt. §2, stk. 2 í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025

Verður fráboðað eftir einføldum leisti skulu bert pkt. 1 til 11 svarast, meðan pkt. 1 til 20 skulu svarast um fráboðað verður eftir vanligum leisti.

**Váttan**

Undirritaði váttar, at upplýsingarnar í hesi fráboðan eru rættar, at fullfíggjað avrit av øllum teimum í K 2 kravdu skjølum eru hjáløgd, og at øll úttalilsi eru givin í góðari trúgv. Um váttanin verður givin av einum øðrum enn luttakandi fyritøkunum, ábyrgdast undirritaði, at upplýsingarnar o.a. eru givnar vegna allar tær fráboðandi ella umsøkjandi fyritøkurnar.

Undirritaði og allar tær fráboðandi fyritøkurnar eru kunnugar við revsireglurnar í §§ 34 og 35 í kappingarlógini.

Stað og dagfesting: ________________ tann __-__-____ Undirskrift: _________________________

Stað og dagfesting: ________________ tann __-__-____ Undirskrift: _________________________

Stað og dagfesting: ________________ tann __-__-____ Undirskrift: _________________________

Stað og dagfesting: ________________ tann __-__-____ Undirskrift: _________________________

Stað og dagfesting: ________________ tann __-__-____ Undirskrift: _________________________

## 1. Almannakunngerð av samanleggingini

Gerð eina lýsing av samanleggingini, sum kann almannakunngerast, t.e. uttan trúnaðarupplýsingar og handilsloyndir. Kappingareftirlitið tekur støði í hesi lýsing, tá fráboðanin verður almannakunngjørd, sbrt. § 16, stk. 2 í kappingarlógini.

Lýsingin skal í minsta lagi innihalda upplýsingar um hvørjar luttakandi fyritøkur eru, slag av samanlegging, virksemi hjá luttakandi fyritøkum, og hvørjar marknaðir samanleggingin fer at ávirka:

## 2. Upplýsingar um luttakandi fyritøkur:

Upplýsast skal hvørjar luttakandi fyritøkurnar eru, undir hesum hvør fráboðar og møguligt umboð fyri fráboðara. Øll skjøl, herundir avgerðir, verða einans send til fráboðara. Letur fráboðari seg umboða av øðrum, verða øll skjøl send hesum umboði.

### 2.1 Fráboðari:

| Navn: | |
|---|---|
| Skrásetingar nr: | V-tal: |
| Bústaður: | Post nr og býur: |
| Kontaktpersónur: | Beinleiðis tlf nr: |
| Tlf nr: | Fartelefon nr: |
| Teldupostur: | |
| Vinnugrein: | |

### 2.2 Umboð fyri fráboðara:

| Navn og starv: | |
|---|---|
| Bústaður: | Post nr og býur: |
| Tlf nr: | Fartelefon nr: |
| Teldupostur: | |

### 2.3 Aðrar luttakandi:

| Navn: | |
|---|---|
| Partafelagsnummar: | V-tal: |
| Bústaður: | Post nr og býur: |
| Kontaktpersónur: | Beinleiðis tlf nr: |
| Tlf nr: | Fartelefon nr: |
| Teldupostur: | |
| Vinnugrein: | |

### 3. Fráboðan til aðrar kappingarmyndugleikar

| | |
|---|---|
| Myndugleiki: | Kontaktpersónur: |
| Tlf nr: | Teldupostur: |
| Myndugleiki 2: | Kontaktpersónur: |
| Tlf nr: | Teldupostur: |
| Myndugleiki 3: | Kontaktpersónur: |
| Tlf nr: | Teldupostur: |

### 4. Slag av samanleggingum

Set kross hvørt talan er um:

□ at tvær ella fleri sjálvstøðugar fyritøkur verða lagdar saman, sbrt. § 13, stk. 1, nr. 1 av kappingarlógini, ella

□ at ein ella fleiri fyritøkur fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat, sbrt. § 13, stk. 1, nr. 2 av kappingarlógini, ella

□ at samváði verður stovnaður sum varandi hevur um hendur allar funktiónir í eini sjálvstøðugari fyritøku, sbrt. § 13, stk. 2 av kappingarlógini, ella

□ at ræði á annan hátt fæst á rakstrinum á eini fyritøku, sbrt. § 13, stk. 3 av kappingarlógini.

### 5. Tíðarætlan og prísur

**5.1** - Upplýs um tíðarætlanina fyri fremjan av samanleggingini:

**12.2** – Allir limir í leiðslu ella nevnd hjá luttakandi fyritøkunum og tær í 7.3.A og 7.3.B nevndu fyritøkum, sum eisini eru limir í leiðslu ella nevnd í aðrari fyritøku, sum hevur virksemi á teimum marknaðum, sum eru nevndir undir pkt. 8 og pkt. 13.

| Navn | Luttakandi fyritøka o.a. | Starv í luttakandi fyritøku | Onnur fyritøka | Starv í aðrari fyritøku |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

**12.3** – Allar yvirtøkur sum eru framdar av fyritøkum nevndar í pkt. 7 á marknaðum, sum eru nevndir undir pkt. 13 seinastu 3 árini.

| Ár | Yvirtikin fyritøka | Keypari | Seljari |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

**13. Ávirkaðir marknaðir**

Viðkomandi marknaður er at meta sum ávirkaður marknaður, tá ið:

A. Tvær ella fleiri av luttakandi fyritøkunum hava virksemi á sama vørumarknaði, og at samanleggingin hevur við sær at samlaði marknaðarparturin kemur uppá 25% ella meira (Vatnrætt samband), ella
B. Ein ella fleiri av luttakandi fyritøkunum hava virksemi í einum seinna ella fyrra liði til ein vørumarknað, har ein ella fleiri aðrar av luttakandi fyritøkunum hava virksemi, og har hvør sær ella tilsamans hava ein marknaðarpart uppá minst 50%, uttan mun til um annar er veitari og hin er kundi (lodrætt samband).

Upplýs allar ávirkaðar marknaðir.

| Marknaður | Fyritøka 1 | Fyritøka 2 | Fyritøka 3 | Fyritøka 4 |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

**14. Veitarabygnaðurin**

Upplýs um 5 av størstu veitarunum hjá hvørjari av luttakandi fyritøkunum á hvørjum einstøkum marknaði nevndir undir pkt. 13 (**Printa eyka síðu um neyðugt**):

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marknaður | | | | |
| Luttakandi fyritøka | | | | |
| Veitari | | | | |
| Kontakt persónur og tlf nr. | | | | |
| Vøra | | | | |
| Lutfall av saml. keypinum | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marknaður | | | | |
| Luttakandi fyritøka | | | | |
| Veitari | | | | |
| Kontakt persónur og tlf nr. | | | | |
| Vøra | | | | |
| Lutfall av saml. keypinum | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marknaður | | | | |
| Luttakandi fyritøka | | | | |
| Veitari | | | | |
| Kontakt persónur og tlf nr. | | | | |
| Vøra | | | | |
| Lutfall av saml. keypinum | | | | |

**15. Útboðsbygnaður**

Upplýs hvørjar útbreiðsluskipanir og tænastuskipanir (umvæling og viðlíkahald) eru á teimum marknaðum sum eru nevndir undir pkt. 13A.

**15.1** – Upplýs um tær mest nýttu útbreiðsluskipanirnar og í hvønn mun útbreiðslan verður framd av luttakandi fyritøkunum ella triðja parti:

**15.2** – Upplýs um tær mest nýttu útbreiðsluskipanirnar og í hvønn mun hesar skipanir verða framdar av luttakandi fyritøkunum ella av triðja parti:

**15.3** – Upplýs samlaða máttin fyri framleiðslu- og útbreiðsluskipanir á marknaðinum, hvussu stóran part av hesum mátti luttakandi fyritøkurnar standa fyri, og hvussu stórur partur av máttinum hjá luttakandi fyritøkunum verður nýttur:

**15.4** – Upplýs onnur viðurskifti, ið kunnu hava týdning fyri útboðsstrukturin:

## 16. Eftirspurningsbygnaður

**16.1** - Upplýs um 5 av størstu kundunum hjá hvørjari av luttakandi fyritøkunum á hvørjum einstakum marknaði nevndir undir pkt. 13A. **(Printa eyka síðu um neyðugt)**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marknaður | | | | |
| Luttakandi fyritøka | | | | |
| Kundi | | | | |
| Kontakt persónur og tlf nr. | | | | |
| Vøra | | | | |
| Lutfall av saml. keypinum | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marknaður | | | | |
| Luttakandi fyritøka | | | | |
| Kundi | | | | |
| Kontakt persónur og tlf nr. | | | | |
| Vøra | | | | |
| Lutfall av saml. keypinum | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marknaður | | | | |
| Luttakandi fyritøka | | | | |
| Kundi | | | | |
| Kontakt persónur og tlf nr. | | | | |
| Vøra | | | | |
| Lutfall av saml. keypinum | | | | |

**16.2** – Upplýs um hvussu gongdin hevur verið á marknaðunum undir pkt. 13 seinastu 5 árini. Er samlaði eftirspurningurin vaksin ella fallin seinastu árini? (**Viðmerk fyri hvønn marknað**)

**16.3** – Viðmerk fyri hvønn marknað undir pkt. 13, um hann er undir byrjan, víðkan, um hann er fullmentur ella um marknaðurin er í afturgongd:

**16.4** - Upplýs um produktdifferentieringin er vanlig á marknaðunum undir pkt. 13, og í hvønn mun vørurnar hjá luttakandi fyritøkum kunnu varasetast (substitión).

**16.5** – Upplýs um tað tekur lutfalsliga langa tíð og um tað er lutfalsliga kostnaðarmikið hjá kundum at skifta veitara?

**16.6** – Er stór miðsavning á kundasíðuni? T.e. í hvønn mun er talan um fáar og stórar kundar, ella er talan um smærri men fleiri kundar. Er tað meir blanda? Forklára niðanfyri:

**16.7** – Upplýs um úrvalsavtalur um útbreiðslu ella um aðrar avtalur við langari bindingartíð eru vanligar á marknaðunum undir pkt. 13.

**16.8** – Ger eina deiling av kundunum, í kundabólkar og ger eina lýsing av hvørjum bólki:

---

## 17. Atgongd til marknað

Upplýs fyri hvønn marknað í pkt. 13A fylgjandi punktir:

**17.1** – Hvørjar fyritøkur eru komnar inn á marknaðin seinastu 5 árini (**printa eyka um neyðugt**):

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marknaður | | | | |
| Navn á fyritøku | | | | |
| Bústaður | | | | |
| Kontakt persónur og/ella tlf nr. | | | | |
| Teldupostur | | | | |
| Marknaðarpartur **(meting)** | | | | |

**17.2** – Hvørjar fyritøkur eru farnar av marknaðinum seinastu 5 árini (**printa eyka um neyðugt**):

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Marknaður | | | | |
| Navn á fyritøku | | | | |
| Bústaður | | | | |
| Kontakt persónur og/ella tlf nr. | | | | |
| Teldupostur | | | | |
| Marknaðarpartur **(meting)** | | | | |

**17. 3** – Er nøkur av luttakandi fyritøkunum í hesari fráboðanini komin inn á onkran av marknaðunum seinastu 5 árini? Hvør fyritøka, hvør marknaður og hvørjar atgongdsforðingar vóru til staðar?

**17.4** – Hvørjar aðrar fyritøkur kundu møguliga, uttan stórvegis umlegging, komi inn á ein av teimum nevndu marknaðunum í pkt. 13? Greið frá hví hesar fyritøkurnar kunnu tað.

**18. Onnur viðurskifti av týdning fyri atgongd til marknaðir.**

**18.1** – Ger eina meting av byrjanarkostnaðinum hjá eini fyritøku, sum trínur inn á marknaðin, eina meting av minsta marknaðarluti henda fyritøkan skal hava fyri at virksemið gevur yvirskot, og hvussu long tíð mett verður skal ganga, fyri at virksemið á marknaðinum gevur yvirskot:

| Pkt. 13 - Marknaður | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Byrjanarkostnaður | | | | |
| Minsti marknaðarlutur | | | | |
| Áramál áðrenn yvirskot | | | | |

| Pkt. 13 - Marknaður | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Byrjanarkostnaður | | | | |
| Minsti marknaðarlutur | | | | |
| Áramál áðrenn yvirskot | | | | |

**18. 2** – set kross fyri um viðkomandi eru galdandi viðvíkjandi atgongd, og greið frá um so er:

□ Har eru møguligar lógarforðingar og/ella regulerandi forðingar, so sum krav um almenna góðkenning ella standardir

Um ja, greið frá:

□ Har eru stórdriftsfyrimunir viðvíkjandi framleiðslu og/ella útbreiðslu av vørum:

Um ja, greið frá:

□ Tað hevur týdning at man fær atgongd til neyðugt infrakervið, rávøru ella líknandi:

Um ja, greið frá:

□ Luttakandi fyritøkur á marknaðunum hava samstarvsavtalur sínamillum ella við triðjamann um t.d. gransking, menning, loyvir, felagsframleiðslu ella útbýting o.a

Um ja, greið frá:

**19. Vinnugreinafeløg o.til.**

**19.1** – Upplýsast skal um luttakandi fyritøkurnar og møguligir kappingarneytar eru limir í vinnugreinafeløgum ella øðrum áhugabólkum innan vinnulív:

**19.2** – Upplýsast skal um kundar og veitarar eru limir í vinnugreinafeløgum ella øðrum áhugabólkum innan vinnulív:

## 20. Virknisfyrimunir (effektivitetsgevinster)

Um fráboðari ynskir at Kappingareftirlitið tekur atlit til ávísar virknisfyrimunir, sum samanleggingin væntandi fer at hava, skal upplýsast:

A. Hvussu ætlaða samanleggingin førir til virknisfyrimunir fyri samanløgdu fyritøkuna.
B. Eina meting av búskaparliga virðinum á hesum fyrimunum.
C. Í hvønn mun brúkarin kann fáa ágóðan av hesum fyrimunum.
D. Um luttakandi fyritøkurnar kunnu náa somu fyrimunum uttan ætlaðu samanleggingina.

Upplýs her: